**inni** - trygt og ómaksleyst til hús



### Sethús – Stangavegur 96, Klaksvík

Húsini eru í 2 hæddum á 35,5 fermetrar. Hartil er hálvur kjallari á uml. 20 fermetrar. Búøkið er í alt um 90 fermetrar. Harafturat er hjallur í 2 hæddum. Grundøkið er 195 fermetrar. Byggiár: 1936. Í miðhæddini er inngongd, gongd, køkur, kovi og 2 stovur. Í ovastu hædd er gongd, wc, brúsirúm og 3 kømur. Í niðastu hædd er fýr- / kjallararúm. Í hjallinum er vaskirúm og hjallur. Húsini standa í veðurgóðum umhvørvið og hava gott útsýni. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Stásilig sethús – Leivsgøta 11, Tórshavn

Húsini eru frá síðst í 50'unum, men eru bygd av nýggjum 2003 - 2006. Alt er gjørt av einslistum. Grundøki er 318 fermetrar. Í miðhæddini er inngongd, durur, gestawc, gongd, køkur / borðstova / stova. Í erva er trappugongd við útgongd til stóran altan, har frálíkt útsýni er oman yvir býin, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er sjálvstøðug íbúð. Har er inngongd, durur, stova / køkur, kamar, baðirúm / vaskirúm / fýrrúm. Hartil er stórt bilhús / úthús á 42 fermetrar. Húsini standa nær miðbýnum í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi nær við handil, barnagarð og skúla. Alt er gjørt uttanum. Húsini eru sera væl hildin - sum nýggj - og í sera góðum standi. Eisini eru tey sera dámlig, sjarmerandi og full av hugna. Tey eru í serflokki til aldur og dygd, tá hugsað verður um, at tey standa innan fyri gomlu bøgarðarnar í Havn. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Ovari Vegur 40, Leynar

Húsini eru í 2 hæddum – samlað búvídd er 220 fermetrar umframt ein garaga á 27 fermetrar. Byggiár 1988. Grundøkið er 575 fermetrar. Húsini eru arkitektteknað og sera búvinarlig ("anvendelig"). Tey eru orkusparandi, hava flagtak, hitapumpu umframt miðstøðuhita. Í ovaru hædd er køkur / borðstova, grovkøkur, stór stova, hjúnarúm, gongd, baðrúm, klædnarúm og hjallur. Í niðaru hædd er durur, fýrrúm, 3 kømur, gongd, baðrúm og kjallararúm. Húsini eru sera snotilig, standa í barnavinarligum, hugnligum umhvørvið og hava gott útsýni út á sjógv, og bert 20 minuttir eru til Havnar. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Tvíhús – Reyðagøta 11, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 60,5 - í alt 121 fermetrar. Grundøkið er 257 fermetrar. Byggiár: 1986. Húsini eru eini væl hildin og væl bjálvað tvíhús úr betonelementum við træ ímillum, sum eru sera orkusparandi. Í neðra er inngongd, durur, bryggers, wc, køkur, gongd, borðstova / stova við útgongd til terassu. Í erva er trappugongd, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur, klædnarúm og ovastaloft. Húsini standa í náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi og frítt útsýni er til haga og fjøll.



### Endaraðhús – í Svanga 9, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd 94 fermetrar. Grundøkið er 168 fermetrar. Byggiár: 1993. Í neðra er inngongd, gongd, fýrrúm / vaskirúm, køkur og stova. Í erva er gongd, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur og goymslurúm. Møguleiki er at byggja garagu og hjall omanfyri húsini. Húsini standa í veðurgóðum umhvørvið nær miðbýnum í Havn og hava gott útsýni. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Traðagøta 18, Argir

Húsini eru eini sera fitt nýumbygd sethús í einari hædd á 102 fermetrar. Grundøkið er 595 fermetrar. Byggiár: 1959 / 2002 - alt er gjørt av nýggjum. Har er inngongd, gongd / garderoba, bryggers / fýrrúm, køkur / alrúm / borðsstova, stova, millumgongd, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Stór terassa við góðum sólargangi er frammanfyri, og stórur garður / urtagarður er uttanum. Húsini liggja væl fyri í friðarligum, veðurgóðum, eldra- og barnavinaligum umhvørvi og hava gott útsýni inn yvir Havnina. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Smærugøta 4, 620 Runavík

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml. 123 fermetrar umframt ein bilhús á 40 fermetrar. Grundøkið er 654 fermetrar. Byggiár: 1986. Í miðhæddini er durur, vaskirúm, gongd, baðirúm og køkur / stova. Í ovastu hædd er alrúm / skrivstova, hjúnarrúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er kjallararúm / fýrrúm. Í bilhúsinum, sum er 40 fermetrar, er loft við goymslurúmi og hjalli. Húsini standa sera væl fyri, har er veðurgott og nakað av útsýni. Eisini eru sera góð parkeringsviðurskifti og væl atkomiligt. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Víkarvegur 10, Kvívík

Húsini eru í 3 hæddum, samlað búvídd 175 fermetrar umframt ein garaga á 25 fermetrar. Grundøkið er 238 fermetrar og eitt parkeringsøki er á 30 fermetrar. Húsini eru bygd uml. 1912 og umbygd / umvæld í 1970. Harafturat varð ein tilbygningur gjørdur í 2001. Seinastu 10 árini eru ymiskar umvælingar gjørdar. Millum annað er tak, vindeygu og klædningur, gólv, innveggir og ketil skift/ur. Í miðhæddini er durur, baðirúm, køkur, stova og skrivstova. Í ovastu hædd er hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur og loftsrúm. Í niðastu hædd, sum er 40 fermetrar, er kjallararúm / fýrrúm og ein garaga á 25 fermetrar. Stórt tún er omanfyri húsini. Húsini standa í sera veðurgóðum umhvørvið. Húsini vera seld um, hóskandi boð fæst.



### Sethús – Hetlandsvegur 13, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 140 fermetrar – í alt 280 fermetrar – alt innrættað. Grundøkið er 567 fermetrar. Byggiárið er 1964, men húsini eru høvuðsumvæld í 1994 og annars er klædningur, tak, ketil og oljufýr skift í 2002 - 2004. Húsini eru væl hildin og í sera góðum standi. Í erva er hjallur, inngongd, durur, garderoba, baðirúm, kamar, gongd, køkur, stova og 3 kømur. Í erva er sjálvstøðug íbúð. Har er inngongd, baðirúm, gongd, hjúnarrúm, køkur / borðstova, stova og tvey kømur. Hartil er fýrrúm / vaskirúm og kjallararúm við egnari inngingd. Undir trappuni er amboðsrúm. Garður / urtagarður er runt húsini. Tey standa í veðurgóðum og hugnaligum umhvørvi nær miðbýnum í Havn og nær við skúla, barnagarðar og handlar. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Sethús – á Kjalnesi 3, Kollafjørður

Húsini eru í 3 hæddum – samlað búvídd uml. 225 fermetrar umframt ein terassa á 22 fermetrar. Grundøkið er uml. 500 fermetrar. Byggiár 1965. Í miðhæddini er køkur, 2 stovur, kamar, baðirúm, gongd og trappugongd. Í ovastu hædd er 4 kømur, 3 goymslurúm og gongd. Í kjallaranum er handilshøli, skrivstova, fýrrúm / vaskirúm og trappuuppgongd. Hartil er ein tilbygningur á uml. 21 fermetrar, sum er brúktur til goymslurúm. Húsini standa sera væl fyri, hava góð parkeringsviðurskiftir, og eru tí væl egnað til handilsvirksemið, útleigan o.s.fr. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Sethús – við Matará 4, Syðrugøta

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd 96 fermetrar. Grundøkið er 332 fermetrar. Byggiár: 1958. Húsini eru umvæld og uppdaterað - tak, ketil og vindeygu eru skift og elskipanin er løgd av nýggjum í niðaru hædd. Vatnrør eru eisini løgd av nýggjum. Í erva er durur, gongd, baðirúm, 2 kømur, køkur, kovi og stova. Í neðra er gongd, 2 kømur, kjallararúm, fýr- og vaskirúm. Húsini standa mitt í bygdini, beint við spæliplass og hava sera gott útsýni yvir Gøtuvík. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst



### Stór sethús við 4 íbúðum – Sílagøta 6, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum á 117 fermetrar - í alt 351 fermetrar. 4 sjálvstøðugar íbúðir eru í húsinum. Grundøkið er 452 fermetrar. Húsini eru upprunaliga bygd í 60'unum, men eru uppdaterað so við og við. Miðhæddin er júst nú øll gjørd av nýggjum og ovasta hædd er snollað upp, so húsini nú eru í sera góðum standi. Í niðastu hædd eru 2 íbúðir. Í hvørjari er inngongd, durur, baðirúm, køkur / stova og kamar. Í miðhæddini er inngongd, felags durur, gongd, baðirúm / bryggers, køkur, stova, hjúnarrúm, 2 kømur og goymslurúm. Í ovastu hædd er trappuuppgongd, gongd, køkur / alrúm / stova, baðirúm og 4 stór kømur. Hartil er stórt bilhús / úthús. Húsini standa í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi nær miðbýnum og hava sera gott útsýni oman yvir Havnina. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Grundstykki – Múlheigar 29, Leynar

Ognin er eitt summarhúsgrundstykki á 300 fermetrar á Múlheigum 29 í Leynum. Grundstykki liggur væl fyri og hevur gott útsýni yvir sandin, víkina og fjørðin. Grundstykkið verður selt, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

**inni**

Sosialurin 341800